**Miðvágs missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og vitnimøti, kl. 18.00 Sangbólkurin »Ljós« syngur. Barnaansing. Innsavnan til húsið. Drekka aftaná. Hjartaliga vælkomin.

**Kedron, Sørvágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við breyðbróting. Sunnudagsskúli verður fyri øll børn kl. 11.30. Evangel. møti verður kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Innsamling fyri húsið. Bíbiltími verður aftur týskvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnumorgun kl.10.30 Møti. Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldi kl. 21, Awake við Leif Høj.
Sunnudagin kl. 17, møti við Maibritt Frederiksberg.
Barnamøti kl.17.00.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagur kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagur 10. sept. Møti v/Siggu Skoradal kl. 18.00. Innsamling til arbeiði, drekka aftaná møti
Mikudagur 13. sept. Bíbiltími kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Karmel, Eiði**
Møti sunnukvøldið kl. 19.00 við Sigurd Sørensen.

**Missiónshúsið á Selatrað**
Sunnudagin kl. 16.00 Møti við John S. Myllhamar.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti við John S. Myllhamar, innsavning.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Torstein Johannesen og kl. 21.00 Ungdómsmøti.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús. Øll eru vælkomin.

**Konfirmatión**
Konfirmantarnir í heyst í Norðoya vestara prestagjaldi møta í kirkjuni í Klaksvík **týsdagin 12. september** kl. 17.00. Konfirmatiónin verður 17. s.e. trin. hin 8. oktober 2006 í Klaksvík.

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 10.00 Morgunbøn.
Sunnudagin kl. 14.00 Møti við sunnudasskúla. Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 Morgunmøti.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/ Malberg Olsen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl.17.30 Bøn- og lovsangur, kl. 18.00 Møti.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11.00 Møti v/ Sámal Hanna Lognberg og kl. 18.00 Møti v/ Arnu og Gerhard Lognberg.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Halgunarmøti har evnið er »Ávøkstur Andans« Hallur Ludvig talar. Kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Evangel. møti har evnið er »Veking«. Loytnantur Ragnar Ludvig talar.
Mánadagin kl. 7.00 Morgunbøn. Øll eru vælkomin í Frelsunarherin.

**Missiónshúsið í Sumba**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti við Árna og Ásbjørg Kjærbæk. Ebba og Nimrod syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Ætlanin er at fara túr til Suðuroyar leygardagin 23. sept. kl. 10 av Havnini og heim aftur av Tvøroyri sunnudagin 24. sept. kl.17.30. Leygardagin verður farið í Hvannhaga og sunnudagin gongutúr úr Trongisvági til Fámjins (umleið 3 tímar). Tilmelding (við depositum á kr. 200,- at seta í Norðoya Sparikassa, Leirvík konta nr. 9865-1033381) á Kunningarstovunum tlf. 449449 (417060) og 444860 áðrenn fríggjadagin 15. sept. Kl.14.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@tilhald.fo
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
***Mánadagin 11. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14.00-17.00 Kortspæl, landastrok, bobbspæl, telving, dart og onnur spøl
***Týsdagin 12. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen
kl. 10.00-11.30 Vit syngja, Johann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00 **Hvørji tilboð hevur FK til smá húsarhald?** Sigrid D. Dalsgaard, húshaldslærari
***Mikudagin 13. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen
kl. 10.00-12.00 Vælgerandi handverksætlan á loftinum
Kl. 15.00 Túrur við ella uttan stavar, úr Tilhaldinum yvir Strond og heim eftir Hoyvíksvegnum
***Hósdagin 14. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00 »Lesibólkur«.
kl. 14.00-16.00 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 15. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen
kl. 10.00-12.00 Vælgerandi handverksætlan á loftinum

***Skeið verður í Matgerð undir kvøldskúlaskipanini í vetur. Eitt hold mikudag og eitt hold fríggjadag frá kl. 10.00-13.30. Lærari: Anne Grethe Harlou. Tilm. 316491 (Byrjað verður 27. - 29. sept.)***

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

## Brúðarmyndir



*Vit takka øllum hjartaliga, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara tann 3. juni 2006 og gjørdu dagin ógloymandi. Ein serstøk tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til á stóra degi okkara.*
***Guðrun og Johan Nystrøm***

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá 15-18.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
Vit byrja aftur týsdagin 12. september kl. 15.00. Øll eldri eru vælkomin.

Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nøgv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.




# INFORMASJÓNSSTARV Á HAGSTOVUNI

EIN HEIMASÍÐA VIÐ INFORMASJÓN UM ALT SAMFELAGIÐ - ER TAÐ NAKAÐ FYRI TEG?

Hagstovan sóknast eftir einum fólki, sum skal vera við til at útgeva hagtøl og informasjón um samfelagið á heimasíðuni hjá okkum www.hagstova.fo. Starvið er í fyrsta umfari tíðaravmarkað til eitt ár, við møguleika til at gerast varandi starv.

Vit hava eina heila lítla organisasjón til at framleiða og savna hagtøl um eitt breitt úrval av viðurskiftum, sum hava týdning fyri øll. Uppgávan er at geva informasjónini eitt snið ella skap, sum kann gera turr hagtøl áhugaverd, lesiverd og atkomulig hjá øllum.
Hevur tú áhuga í hagtølum, áhuga í informasjón sum heild, hevur tú evnini til at siga eina søgu í tølum og texti, ella royndir av at arbeiða við heimasíðuforritum av ymsum slag, ert tú vælkomin at søkja starvið. Hevur tú útbúgving sum miðlagrafikari ella aðra viðkomandi miðlaútbúgving, er tað ein avgerandi fyrimunur. Royndir í líknandi størvum telja sjálvsagt eisini við í metingina.

Tú kemur at starvast í einari organisasjón, sum hevur til uppgávu at upplýsa um samfelags-viðurskifti sum heild og sum er snikkað til at loysa júst tað uppgávuna. Títt íkast verður at gera hesa informasjón tøka á internetinum við fleiri ymsum amboðum og tillaga ymiskan lesaratørv.
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Landsstýrið og avvarandi fakfelag.

Umsóknir skulu stílast til Hagstovu Føroya, Glyvursvegur 1, 165-Argir, ella sendast við telduposti til hagstova@hagstova.fo. Umsóknin skal vera okkum í hendi innan 20. septembur og byrjast skal í starvinum skjótast til ber.

Vilt tú vita meira um starvið, ber til at venda sær til Hermann Oskarsson á Hagstovuni, tlf. 352800.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO